## Totti álvarsaman skaða

AS Roma hevur hetta kappingarárið verið sera tengt at Francesco Totti, og tað kom tískil sum ein dyggur smeitur, tá ið miðvallarin um vikuskifti gjørdist álvarsliga skaddur undir Seriu A dystinum móti Livorno. Totti mátti berast av vølli stutt fyri hálvleik, og fyrstu boðini um skaðan vilja vera við, at krossbandið er slitið. Er hetta veruleiki, má Roma vera Totti fyri uttan komandi hálva árið.



## Jón Rói skaddur og útskiftur

Longu tá 8 minuttir vóru farnir av dystinum millum Brabrand og AaB í 2. deild vestur, var Jón Rói Jacobsen so óheppin, at hann fekk opið sár í hárbotnin. Skaðin var so mikið álvarssamur, at Jón Rói var noyddur at fara av vøllinum beinavegin. Dysturin endaði við, at Brabrand vann 2-1 eftir hálvleiksstøðuna 1-0. Hetta var triðja ferðin á rað, sum eykamennirnir hjá AaB taptu í 2. deild vestur.



*Tað tók bara fá sekund hjá nýggja B36-framherjanum, Patrick Sunday Okoro, at staðfesta fyri áskoðarunum, at hann er ein maður við málum í gaggunum*

*Mynd: Einslistir*

B36-Víkingur 2-1 (1-0):

# Gongubóltur í Gundadali

*B36*

*Víkingur*

**Talan var um sera linliga uppgerð, men B36-spælararnir kundu kortini fara nøgdir til hús, tá nýggi áleyparin við sínum fyrsta Formula-sparki søkti Víkingarnar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Patrick Sunday Okoro skuldi ikki nýta nógva tíð, áðrenn hann hevði sett sítt navn fast í minnið hjá B36-fejapparunum.

Arbeiðið við at fáa arbeiðs-oguppihaldspappírini í rættlag hevur drigið nakað út, men mikukvøldið kundi áleyparin tó vera partur av fyrru hálvfinaluni móti HB.

Og sunnudagin kundi hann so fyri fyrstu ferð rigga seg til at spæla Formula-bólt. Leikluturin var tó á beinkinum fyrstu longu løtuna, men eftir 82 minuttum varð hann sendur á vøllin. Og so gingu ikki nógv sekund, fyrr enn nýggi maðurin hevði gjørt vart við seg.

B36 setti hesa ferð fulla ferð á í álopspartinum. Geza Turi helt ikki bóltinum, tá Johan Ellingsgaard smekkaði til, og so var Patrick fyrsti maðurin á returinum.

### Linligur dystur

Málið var sjálvandi hæddarpunktið á degnum hjá B36-fjepparunum. Men saman við mongu viðhaldsfólkunum hjá Víkingi vóru hesi annars vitni til ein dyst av heldur keðiliga slagnum.

Fyrri steðgin hevði B36 í løtum nakað, sum líktist einum trýsti, og teir løgdu seg eisini á odda, tá Bergur Midjord hálvgum tacklaði og hálvgum fluktaði innlegg frá Santos í kassan.

B36 hevði undan dystinum mest sum púrasta umskipað miðvøllin, har Klæmint Matras, Ingi Højsted Odmar Færø restaðu, meðan Hanus Thorleifsson heldur ikki var tøkur til dystin.

Og kanska var tað eisini hendan umskipanin, sum hevði sína ávirkan. Í øllum førum gekk tað eftir steðgin meira enn striltið at fáa spælið at hanga saman. Og tá B36 eisini legði seg djúpari, nú leiðslan skuldi verjast, gav hetta Víkingi at kalla alt initiativið í dystinum.

Hóast gestirnir sjáldan skaptu tær heilt vandamiklu dystirnar, so lá ein útjavning leingi í luftini, og tá hon kom, var talan um sanna perlu frá Andreas Lava Olsen. Magnus Olsen hjálpti honum nakað, tá frálíki bakkurin framdi sítt helst einasta mistak í dystinum, tá hann fór eftir langari sending frá Atla Gregersen. Andreas snaraði sandoyingin av sær, og við einum dómadagsskoti sendi hann úr 19 metrum bóltin í meskarnar.

### Nógvar ónollur

Málið sá út til at geva Víkingi eitt stig við sær, men tað eydnaðist altso ikki hjá teimum at halda fast um hetta í einum dysti, sum annars var merktur av nógvum ónollum. Kanska var langt ímillu tey heilt ógvusligu frísparkini, men talan var um heilt nógv ljót lítil frísparkini, eins og talan fleiri ferðir gjørdist um smærri orrustur millum einstøku spælararnar. Og onkrir skuldu helst eisini fegnast um, at teir finguy loyvi at vera á vøllinun í samfullar 90 minuttir.

Úrslitið av dystinum ber við sær, at B36 enn hongur við í oddinum, har fá annars gövu teimum møguleika at gera seg galdandi í ár. Við í roknistykkinum er tó eisini tann veruleikin, at hvíta havnarfelagið enn bert hevur spælt á heimavølli. Fjórði heimadysturin á rað verður móti EB/Streymi komandi umfarið, og tá fæst ivaleyst ein ábending um, í hvønn mun B36 fer at gera seg galdandi í ár.

Víkingur er hinvegin í tyngra endanum av talvuni, og tað er ein støða, sum hvørki spælarar ella viðhaldsfólk kunnu vera serliga nøgd um. Næstu ferðina eiga teir heimavøll móti NSÍ, og tann uppgerðin kann meira enn nøkur vera tann, sum sendir lagið antin upp gjøgnum lofti ella niður í kjallaran hjá víkingunum.

## Ein góð byrjan

Patrick Sunday Okero var sjálvandi ovurfegin, tá hann fór av vøllinum í Gundadali sunnudagin.

- Eg eri ovurfegin um, at eg kundi fáa eina slíka byrjan. Fyri liðið var málið sjálvandi sera týdningarmikið, men hjá mær sjálvum var hetta eisini framúr. Tað verður jú roknað við, at eg skal skora mál, so sjálvandi hevur tað nógv at siga, segði Patrick Sunday, tá vit hittu hann beint eftir dystin.

Enn eru bara tríggir dystir spældir. Men tit hanga við í oddinum, har tit eru nummar tvey. Tað er væl eisini nakað, sum tit eru nøgdir um?

- Sjálvandi. Men tað er nú, at vit skulu prógva, hvør veruligi dugurin í liðnum er.

## Skuldu hildið trýstinum

Eftir ein seinn hálvleik, har teir sótu á tí mesta, eydnaðist Víkingi at vinna seg upp á javnt. Og tí var tað sum vátur vøttur, tá B36 stutt seinni skeyt tað, sum vísti seg at verða sigursmálið.

- Tað er øgiliga keðiligt. Eg haldi, at vit stríðast væl, men so gera vit eitt mistak, tá vit hava fríspark, og tað verða vit revsaðir fyri. Tað er øgiliga tungt, men vit detta kanska eisini ov langt aftur, eftir at vit høvdu javnað. Vit skuldu bara hildið á fram at trýst, so tað var kanska okkara egna skyld, sigur Niclas Niclasen, sum er skipari á Víkingaskútuni.

Tapið ber við sær, at Víkingur bert hevur trý stig fyri fyrstu tríggjar dystirnar, og tað er Niclas avgjørt ikki nøgdur um.

- Sjálvandi er tað ikki nøktandi. B36 í Havn er hinvegin ein trupul dystur. So eg haldi heldur, at vit skulu iðra okkum um stigini, sum vit ikki vunnu móti ÍF. Í dag høvdu vit verið nøgdir við eitt stig, og tað var eisini nær við. Men tíverri gekk tað ikki, staðfesti Niclas Niclasen.